J.nr. 20080783/CA

# Viðtøkur

**fyri Í/f Antennufelagið Hamarin og Undir Kongavarða**

§ 1

Navn felagsins er Antennufelagið Hamarin og Undir Kongavarða.

Heimstaður felagsins er 160 Argir.

§ 2

Ognarrætturin til felagið til kemur Eigarafelagið Hamaran og Eigarafelagið Undir Kongavarða, sum eiga hvør sína helvt av felagnum.

Hvøgin íognari kann avhenda sín part av felagnum til triðjamann uttan skrivligt loyvi frá hinum íognaranum.

Í sambandi við møguliga sølu av íognarpartinum er altíð tann regla altíð galdandi, at hin íognarin hevur forkeypsrætt at keypa ognarpartin hjá seljandi íognaranum til eitt virði, sum í mesta lagi svarar til eginogn felagsins, uppgjørt sambært seinast góðkenda roknskapi felagins.

Um partarnir ikki kunnu semjast um støddina á eginognini, verður hon endaliga ásett av grannskoðara felagins sambært teimum galdandi roknskaparreglum hjá felagnum.

§ 3

Felagið verður stýrt av eini 6 manna nevnd, sum verður vald av íognarunum fyri 1 ár í senn. Eigarafelagið Hamarin velir 3 limir, meðan Eigarafelagið undir Kongavarða velir 3 limir.

Fyrst valda nevndin, sum tekur við 1. juni 2010, skal skipa seg við einum formanni, sum Eigarafelagið Hamarin útnevnir. Nevndarformaðurin gongur hereftir uppá skift, soleiðis at Eigarafelagið Undir Kongavarða annaðhvørt ár eigur rættin til at útnevna nevndarformannin.

Tó eru partarnir samdir um at Eigarafelagið Hamarin hevur nevndarformannin til upphæddin kr. 250.000,- er goldin sambært § 3 í samognarsáttmálanum millum Eigarafelagið Hamarin og Eigarafelagið Undir Kongavarða frá d.d.

Nevndin skipar seg við einum formanni, næstformanni og kassameistara.

Nevndin fær fulltrú til at fremja endamál felagsins og umboðar íognarfelagið úteftir.

§ 4

Um tað, sum gerst á nevndarfundi, verður frágreiðing skrivað í gerðarbókina.

Nevndin er viðtøkufør, tá ið formaðurin ella næstformaðurin og í minsta lagi 3 aðrir nevndarlimir eru møttir á fundi.

Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendir á jøvnum, hevur formaðurin ella, um hann ikki er hjá, næstformaðurin avgerandi atkvøðuna.

Nevndarformaðurin boðar til nevndarfundar, tá tørvur er á, ella tá ið 2 nevndarlimir krevja tað.

§ 5

Íognarfelagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanninum saman við 2 øðrum nevndarlimum.

§ 6

Nevndin setir ein umsjónarmann til at taka sær av rakstrinum av antennuskipanini. Umsjónarmaðurin skal útinna tær uppgávur, sum nevndin ásetir. Hann skal syrgja fyri, at antennuskipanin virkar til fulnar, og at viðlíkahaldið av henni er nøktandi.

§ 7

Viðvíkjandi nevndarviðgerð er at viðmerkja, at skulu týðandi avgerðir takast, skal semja fyriliggja frá báðum pørtum. Nevndin hevur tó heimild til at taka avgerðir, ið viðvíkja dagliga raksturin av felagnum.

Nevndin hevur ikki heimild til uttan loyvi frá báðum íognarum at veðseta ognir felagsins, at átaka felagnum kautións- ella lániskyldu, at undirskriva skuldarbrøv ella líknandi.

§ 8

Fyri skuld felagsins hefta íognararnir persónliga og solidariskt.

§ 9

§ 13
Á ársfundi verður valdur ein grannskoðari at grannskoða roknskap felagsins. Roknskaparárið er kalendaraárið, og roknskapurin skal setast upp eftir vanligum roknskaparprinsippum. Neyðugar avskrivingar og avsetingar skulu gerast á hvørjum ári, so rakstrarroknskapurin og status vísa eina so rætta mynd sum gjørligt.

§ 14
Íognararnir áseta møguliga samsýning til nevndarlimir og umsjónarmann.

§ 15
At avtaka íognarfelagið krevst samtykki frá báðum pørtum. Verður íognarfelagið upployst, tilfella ognir felagsins til íognararnar í eins stórum pørtum. Verður íognarfelagið upployst, skal grannskoðari felagsins gera roknskap fyri tíðarskeiðið frá síðsta roknskaparári til uppgerðardagin, umframt eina uppgerð yvir ogn og skuld hjá felagnum eftir meting av virðinum í handli og vandli.

Avlop og hall í rakstrarroknskapinum verða at býta javnt millum íognararnar.

§ 16
Verður ósemja íognarana millum um tulking av viðtøkum felagsins og samognarsáttmála millum somu partar, eiga partarnir fyrst og fremst at royna semju. Fæst ikki semja millum partarnar, verður ósemjan at leggja fyri ein gerðarrætt.

Hvør av pørtunum velir sín gerðarrættardómara, og hesir skulu semjast um ein uppmann. Kunnu hesir ikki semjast, verður uppmaðurin útnevndur av sorinskrivaranum.

Hevur ein av pørtunum ikki valt sín gerðarrættardómara 14 dagar eftir, at hin skrivliga hevur boðað honum frá, hvønn hann hevur valt, verður hesin eisini útnevndur av sorinskrivaranum.

Úrskurðurin hjá gerðarrættinum er endaligur og bindandi fyri báðar partar og kann útinnast beinanvegin.

Gerðarrætturin ásetir sjálvur reglurnar fyri viðgerðini, herundir hvør skal rinda útreiðslurnar.

Tann parturin, sum ynskir gerðarrættin settan, skal skrivliga seta fram ynski um hetta við tilskilan av rættarmálsskravi sínum og við hvørjum grundgevingum, hann styðjar sítt krav við. Eisini skal viðkomandi leggja fram tey skjøl, hann vil styðja seg til.

Mótparturin skal hereftir innan 14 dagar leggja fram svarrit við sínum grundgevingum og leggja fram tey skjøl, hann vil styðja seg við, samstundis sum hann skal upplýsa, hvønn gerðardómara hann hevur valt í gerðarrættin.

Báðir íognararnir hava skyldu at virka fyri, at íbúgvararnir í økinum gerast nýtarar av antennuskipanini. Nevndin tekur avgerð um, hvussu stórt útboðið av sjónvarpsrásum skal vera og kostnaðin, sum hvørt húski skal gjalda.

Endamálið við íognarfelagnum er ikki at reka handilsligt virksemi, men at raksturin í størst møguligan mun skal hvíla í sær sjálvum. Tó skulu avsetingar gerast til neyðugar avskrivingar soleiðis, at íognarfelagið er ført fyri at endurnýggja útgerðina, tá tørvur er á hesum.

Nevndin skal á hvørjum ári seta upp eina rakstraræltan, sum vísir allar inntøkur og allar útreiðslur og neyðugar avsetingar.

Nevndin ásetir við støði í hesi rakstraræltan, javnað við úrslitinum frá árinum frammanundan, tað gjald, sum nýtararnir av antennuskipanini skulu rinda.

§ 10

Á hvørjum ári verður ein ársfundur skipaður í íognarfelagnum. Ársfundurin er hægsti myndugleiki felagsins.

Einans íognararnir kunnu møta á ársfundunum. Hvørt eigarafelag sær ger av, hvørji umboð luttaka á ársfundunum.

Til at samtykkja broytingar í hesum viðtøkum krevst semja millum báðar íognararnar.

§ 11

Ársfundurin verður hildin í februar mánaða við hesi dagsskrá:

1. Nevndarfrágreiðing um virki felagsins í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Innkomin mál
4. Val av nevndarlimum
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt

§ 12

Ársfundurin verður hildin á Argjum, og fundarboð verða send íognarunum skrivliga í minsta lagi 8 dagar undan fundinum.

Ársfundurin velir ein fundarstjóra.

Um tað, sum fer fram á ársfundi, verður frágreiðing skrivað í gerðarbók, góðkend av nevndini. Frágreiðingin verður undirskrivað av fundarstjóranum og nevndarformanninum.

Íognarnarnir kunnu hvør sær, nær sum helst, krevja eyka ársfund settan til viðgerðar av einum evni, sum verður tilskilað. Tað sama er galdandi, um 3 nevndarlimir krevja hetta.

§ 17
Hesar viðtøkur verða skrivaðar undir í tveimum eintøkum, harav hvør íognarin fær sítt eintakið.

Tórshavn, tann 11/5 - 2010